**Nevndarfundur tann 23/4-2023:**

Luttakarar:

Villi Hansen

Erhard Olsen

Fríðrikur Henriksen

Jórun Joensen

Ruth Joensen

Fundarboð og skrá

Fundaboð og skráin var sent út rættstundis og tískil var fundurin avrikin lógligani. Skráin bleiv viðtikin á fundinum.

Fundarstað og fundartíð

Fundurin var hildin heima hjá Fríðrikki í Nykøbing Falster.

Fundurin byrjaði kl. 13:00 og endaði kl. 16:30.

Skrá:

Skráin sum var viðtikin fundin.

- Seta nevndina:
- Fundurtíðspunkt:
- Aðalfundur 2024
- Tiltøk skipa av núvernadi nevnd:
    - Berlin/Hamburg 2024
    - Jólabordhald 2024:
    - Summar tiltak
    - Ræstkjøtaveitsla
- Evt.

Seta nevndina

Fyrsta punkt á skránni var setan av nevndina. Nevndin bleiv skipa sum fylgjandi:

**Formaður:**

Tað bleiv einmælt viðtikið at Villi Hansen heldur fram sum formaður.

**Næstformaður:**

Tað bleiv einmælt viðtikið at Erhard Olsen heldur fram sum næstformaður og Webmaster felagsins.

**Kassameistari**

Tað bleiv einmælt viðtikið at Jórun Joensen heldur fram sum kassameistari.

**Skrivari:**

Tað bleiv einmalt viðtikið at Fríðrikur Henriksen (nýggjur nevndarlimur) tekur yvir sessin sum skrivari í felagnum eftir Ása Hansen (fráfarin nevndarlimur).

**Vanligur nevndarlimur:**

Ruth Joense heldur fram sum vanligur nevndarlimur

<u>Fundartíðspunkt</u>

Nevndarfundirnar hava áður veri avriknar á gerðanisdøgum. Av tí at Fríðrikur ikki hevur møguleika at møtast á gerðamdisdøgum bleiv tað viðtiki at fundirnar í núverandi skipaða nevnd vera avriknar um vikuskifti.

<u>Aðalfundur 2024</u>

Tað bleiv einmælt viðtikið at aðalfundurin 2024 verur hildin leygardaing tann 16. mars 2024.

<u>Tiltøk sum skipast av núverandi nevnd</u>.

**August 2023 - Útferð**

Tað bleiv viðtikið at kanna møguleikan fyri at skipa fyrin eina útferð til antin Femern ella Storstrøm byggjaríði tann 19. august 2023.

**Novembur 2023- Jólaborðhald**

Nevndin viðtók at halda jólaborðhald leygardagin tann 25. novembur 2023. Nevndin bleiv einig um at kanna møguleikan at fáa Hallur Joensen til at spæla til jólaborðhaldið.

**Januar 2024 – Ræstkjøtaveitsla**

Nevndin bleiv einig um at skipa fyri ræstkjøtaveitsla í januar 2024. Av tí at tað áður hevur veri torført at finna høli til at halda veitsluna, bleiv nevndin einig um at veitslan kundi haldast heima hjá Fríðrikki í Nykøbing Falster. Nevndin vil kanna møguleikan at fáa ræstkjøt úr Føroyum til Danmarkar. Dato fyri ræstkjøtaveitsla er fyribils ein av fylgjandi døgum: 20. Januar 2024, 27. Januar 2024 ella 3. Februar 2024

**Vár 2024 – Ferð til Berlin**

Nevndin viðtók at arbeiða víðari við fyriskipan av bussferð til Berlin um várið 2024.

<u>Evt.</u>

**Betri fundarsigur**

Tað bleiv viðtikið at nevndin skuldi vera betri til at yvirhalda fundartíðspunkt, sum var avtala frammanundan nevndarfundinum.

**Næsti fundur**

Nevndin viðtók at avtala næsta fund á Messenger.